# Mentanarligur upptúrur – fótbóltsligur niðurtúrur



Gullregn yvir Barcaspælarunum

**Listafrøðiliga og mentanarliga var stórsligið at uppliva Rom. Í Champions League finaluni var tað bert annað liðið, sum stóð fyri tí listarliga. Mótstøðuliðið meldaði seg úr dystinum aftaná átta minuttir**

## Fótbóltsferð



**Heri Simonsen**
heris@sosialurin.fo
Myndir: Eli Christiansen

»Allir vegir føra til Rom«, sigur ein meira enn 2.000 ára gomul máliska. Aftaná at hava vitjað Rom í 6 dagar, spældi eg mær við tankanum, um ikki Rom og Toftir burdu verið vinarbýir. Tað er ið hvussu er ríkiligt við toftum, sum liggja í Rom. Navnið »Rom« hevur altíð givið eitt bergmál í hugaheiminum. Stórbærir filmar frá seinast í fimtiárunum og fyrst í sekstiárunum, so sum »Ben Hur« og »Spartacus« ristu stórbæru fornu tíðina hjá rómverjum fast í unga barnasinni. Rómverjar fylla eisini rættiliga nógv í halgubók, og er italski høvuðsstaðurin saman við grikska høvuðsstaðnum, Athen søguríkasti høvuðsstaðurin í Europa.

Tá so A-liðið hjá undirritaða, Manchester United og B-liðið, Barcelona vunnu sær sætið í Champions League finaluni á tí olympiska leikvøllinum í Rom, so var bara rudda alt av vegnum, og fara við flogfarinum hjá SAS, fyri at kunna liggja seks nætur í Rom.

### Fótbóltur bert ein partur

Tey ið ilskast um fótbólt vilja framhevja, at tað er rapl-andi svakt at brúka nógvan pening, bara fyri at síggja ein